Løgmansskrivstovan

Løgtingið

Dagfesting: 2. november 2020
Mál nr.: 0605-010/20
Málsviðgjørt: KTH
Eftirkannað: 1. oktober 2020

Uppskot til løgtingslóg um yvirvøku við vakmyndatóli

Uppskot til

Løgtingslóg
um
yvirvøku við vakmyndatóli

Yvirvøka við vakmyndatóli

§ 1. Yvirvøka við vakmyndatóli er at skilja sum skipað ella regluliga endurtakandi yvirvøka av persónum við fjarstýrdum ella sjálvvirkandi vakmyndatóli, myndatóli ella líknandi.
Stk. 2. Ásetingarnar um yvirvøku við vakmyndatóli eru eisini galdandi, tá slík tól verða sett upp.

Privat

§ 2. Tað er ikki loyvt privatum við vakmyndatóli at yvirvaka gøtu, veg, pláss ella líknandi øki, sum verður nýtt til vanliga ferðslu.

§ 3. § 2 er ikki galdandi fyri:
1) Yvirvøku av bensinstøðum, ídnaðarvirkjum, innilokaðum handilsmiðstøðum og líknandi økjum, har vinnuligt virksemi fer fram, um tann sum hevur ræði á økinum stendur fyri yvirvøkuni.
2) Yvirvøku við peningasjálvtøkur o.tíl. ella bilar, sum einans verða nýttir til flutning av peningi, um tann sum hevur ræði á sjálvtøkuni ella bilinum stendur fyri yvirvøkuni, og yvirvøkan einans er rætta móti persónum, sum eru beint við sjálvtøkuna ella bilin.
3) Yvirvøku, sum peningastovnar o.tíl., gistingarhús, matstovur, handilsmiðstøðir og handlar, har sum smásøla fer fram, hava av:
   a) egnum inngongdum, framsíðu og baksíðu, og
   b) økjum, sum eru beinleiðis knýtt at egnum inngongdum, framsíðu ella baksíðu, og sum natúrliga verða nýtt ella kunna nýtast sum atgongd ella rýmingarleið, um yvirvøkan greitt er neyðug til tess at fyribyrgja lógarbrotum.
4) Yvirvøku í tunlum, undir hesum á gjaldsstøðum við tunnilsmunnar og á innkoyringarvegum, til tess at økja um trygdina ella til tess at krevja gjald um tann, sum hevur ábyrgdina av trygdini

ella gjaldsskipanini stendur fyri yvirvøkuni.
5) Yvirvøku, sum ikki verður tikin upp á video, film o.tíl., tá talan er um yvirvøku av egnum inngongdum, framsíðu, baksíðu, girðing ella líknandi.

§ 4. Uttan mun til § 2 kann politiið í samráð við landsstýrismannin í serligum førum eftir umsókn geva fyritøkum, feløgum o.ø. loyvi til við vakmyndatóli at yvirvaka, tá hetta verður mett neyðugt til tess at fyribyrgja lógarbrotum. Eitt loyvi kann verða treytað og kann ikki hava longri gildistíð enn 2 ár.
Stk. 2. Avgerðir sbrt. stk. 1 eru endaligar innan fyrisitingina.

§ 5. Viðgerð av persónupplýsingum í sambandi við yvirvøku við vakmyndatóli, sbrt. §§ 3 og 4, er fevnd av løgtingslóg um vernd av persónupplýsingum.

Almennir myndugleikar

§ 6. Viðgerð av persónupplýsingum í sambandi við yvirvøku við vakmyndatóli, sum almennur myndugleiki stendur fyri, er fevnd av løgtingslóg um vernd av persónupplýsingum.

Skelting

§ 7. Privat og almennir myndugleikar, sum við vakmyndatóli yvirvaka støð ella høli, sum vanlig atgongd er til, ella arbeiðspláss, skulu skelta ella á annan líknandi hátt týðiliga gera vart við yvirvøkuna.
Stk. 2. Stk. 1 er ikki galdandi fyri yvirvøku av bilum, sum einans verða nýttir til flutning av peningi, sbrt. § 3, nr. 2, og yvirvøku, sum ikki verður tikin upp, sbrt. § 3, nr. 5.
Stk. 3. Landsstýrismaðurin kann áseta nærri reglur um skelting, sbrt. stk. 1.

Víðarigeving og striking

§ 8. Myndaupptøkur og ljóðupptøkur sum innihalda persónupplýsingar, og sum eru gjørdar í sambandi við yvirvøku við tí endamáli at fyribyrgja lógarbrotum, kunnu einans gevast víðari til onnur í hesum førum:
1) Tann skrásetti hevur givið nágreiniligt samtykki.
2) Víðarigevingin er heimilað í lóg.
3) Víðarigevingin er til politiið til tess at politiið kann kanna og avdúka lógarbrot.

Stk. 2. Upptøkur fevndar av stk. 1 skulu strikast í seinasta lagi 30 dagar eftir upptøkuna, sbr. tó stk. 3.
Stk. 3. Upptøkur sbrt. stk. 1 kunnu goymast meira enn 30 dagar, um tað er neyðugt fyri at dátuábyrgdarin kann viðgera eina ítøkiliga ósemju. Í hesum førum skal dátuábyrgdarin innan 30 dagar kunna tann, sum ósemjan er við, og eftir umbøn geva viðkomandi avrit av upptøkuni.

Eftirlit

§ 9. Dátueftirlitið hevur eftirlit við viðgerð av persónupplýsingum sbrt. § 8.
Stk. 2. Tann, sum setur upp vakmyndatól, myndatól ella líknandi, sbrt. § 1, skal boða Dátueftirlitinum frá. Dátueftirlitið førir eina skrá yvir tól fevnd av 1. pkt.
Stk. 3. Munandi broytingar í yvirvøkuni, sum er fráboðað sbrt. stk. 2, skulu fráboðast Dátueftirlitinum.

Revsing o.tíl.

§ 10. Brot á § 2, § 7, stk. 1, § 9, stk. 2, 1. pkt. og § 9, stk. 3 verður revsað við sekt.
Stk. 2. Brot á treytir í loyvum sbrt. § 4, stk. 1 verður revsað við sekt.
Stk. 3. Um ikki hægri revsing er ásett eftir aðrari lóggávu, verður tann revsaður við sekt ella fongsli í upp til 6 mánaðir, sum brýtur § 8.
Stk. 4. Við reglum givnum við heimild í løgtingslógini kann ásetast revsing við sekt.

Stk. 5. Feløg og aðrir løgfrøðiligir persónar, koma undir revsiábyrgd eftir reglunum í kapitli 5 í revsilógini.
Stk. 6. Í málum um brot á hesa løgtingslóg kann húsarannsókn fara fram eftir reglunum í retsplejelov for Færøerne um húsarannsókn í málum, sum hava við sær frælsisrevsing.

Gildiskoma

§ 11. Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. januar 2021, og samstundis fer lov nr. 278 af 9. juni 1982 om forbud mod privates TV-overvågning m.v., som sat i kraft ved kongelig anordning nr. 155 af 21. marts 1988, úr gildi.
Stk. 2. Vakmyndatól, myndatól og líknandi, sum sambært § 9, stk. 2, 1. pkt. skulu fráboðast Dátueftirlitinum, og sum eru sett upp, áðrenn henda løgtingslóg kemur í gildi, skulu fráboðast Dátueftirlitinum í seinasta lagi 1. juli 2021.

Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

1.1. Orsakir til uppskotið

Galdandi lóg um yvirvøku við vakmyndatóli er donsk lóg frá 1982 (lov om forbud mod privates TV-overvågning m.v.), sum bleiv sett í gildi í Føroyum í 1988. Lógin bleiv sett í gildi uttan broytingar í mun til donsku upprunalógina og er ikki broytt síðani. Lógin á økinum er sostatt innihaldsliga næstan 40 ára gomul.

Í arbeiðinum við nýggju dátuverndarlógini, sum kemur í gildi 1. januar 2021, er vorðið greitt, at reglurnar um at yvirvaka við vakmyndatóli eiga at verða dagførdar, og at lógin um forbud mod privates TV-overvågning m.v. eigur at verða endurskoðað.

Niðurstøðan er, at tað framhaldandi er tørvur á eini løgtingslóg um yvirvøku við vakmyndatóli, og tí verður hetta lógaruppskotið lagt fyri Løgtingið.

1.2. Galdandi lóggáva

Lóg um forbud mod privates TV-overvågning

Galdandi lóg um yvirvøku við vakmyndatóli er lov nr. 278 frá 9. juni 1982 om forbud mod privates TV-overvågning, sum sett í gildi við kongaligari fyriskipan nr. 155 frá 21. mars 1988. Lógin er ikki broytt, síðani hon bleiv sett í gildi í 1988.

Økið hevur síðani 2006 verið føroyskt sermál, sbrt. § 1, stk. 1 í løgtingslóg nr. 41 frá 10. mai 2006 um ræði á málum og málsøkjum.

Lógin setur forboð fyri, at privat yvirvaka við vakmyndatóli á øki við vanligari ferðslu, t.e. almenn øki. Yvirvøka við vakmyndatóli er at skilja sum skipað ella regluliga endurtakandi yvirvøka av persónum við fjarstýrdum ella sjálvvirkandi vakmyndatóli, myndatóli ella líknandi. Ásetingarnar um yvirvøku við vakmyndatóli eru eisini galdandi, tá slík tól verða sett upp.

Lógin fevnir ikki um almennar myndugleikar.

Í lógini eru ásett tvey undantøk frá forboðnum fyri privatari yvirvøku av almennum øki. Bannið er sostatt ikki galdandi fyri yvirvøku av bensinstøðum, ídnaðarvirkjum, innilokaðum handilsmiðstøðum og líknandi økjum, har vinnuligt virksemi fer fram, um tann sum hevur ræði á økinum stendur fyri yvirvøkuni, ella yvirvøku, sum ikki verður tikin upp á video, film o.tíl., tá talan er um yvirvøku av egnari inngongd, framsíðu, girðing ella líknandi.

Um privat yvirvaka við vakmyndatóli á økjum, sum eru alment atkomulig, og sum ikki eru fevnd av banninum móti yvirvøku av almennum støðum, skal týðiliga skeltast við hesum.

Brot á forboðið ímóti yvirvøku ella kravið um skelting kann revsast við sekt.

Persónsupplýsingarlógin og dátuverndarlógin

Persónsupplýsingarlógin frá 2001 fevnir um viðgerð av persónupplýsingum, sum bæði almennir myndugleikar og privat standa fyri. Hetta ger, at løgtingslógin í flestu førum eisini fevnir um yvirvøku við vakmyndatóli, av tí at persónupplýsingar verða viðgjørdar.

Hetta merkir, at bæði almenn og privat yvirvøka við vakmyndatóli, sum ikki er bannað sambært lógini um forbud mod privates TV-overvågning, skal lúka treytirnar í persónsupplýsingarlógini um persónupplýsingar verða viðgjørdar.

At persónsupplýsingarlógin er galdandi hevur m.a. við sær, at tað altíð skal vera ein saklig orsøk til yvirvøkuna, og at yvirvøkan – sum kann vera eitt inntriv í persónliga frælsið hjá tí einstaka – altíð skal lúka lutfalsmeginregluna. Umframt at lúka alment galdandi meginreglurnar fyri viðgerð av persónupplýsingum, skal ábyrgdarin eisini hava eitt viðgerðargrundarlag umframt at lúka treytirnar um trygd í sambandi við viðgerð.

Sambært persónsupplýsingarlógini krevur viðgerð av viðkvomum persónupplýsingum loyvi frá Dátueftirlitinum. Persónsupplýsingarlógin verður umsitin soleiðis, at hetta kravið hevur við sær, at tað altíð krevst loyvi til uppseting av vakmyndatólum.

Í kunngerð, sum hevur heimild í persónsupplýsingarlógini, er harumframt ásett, at øll – bæði almenn og privat – skulu fráboða vakmyndatól til Dátueftirlitið.

Nýggj dátuverndarlóg kemur í gildi 1. januar 2021 samstundis sum henda løgtingslóg. Hetta ger, at persónsupplýsingarlógin og kunngerðirnar við heimild í persónsupplýsingarlógini verða settar úr gildi. Krav um loyvi frá Dátueftirlitinum til viðgerð fellur sostatt burtur, eins og kravið um fráboðan í kunngerðini fellur burtur.

Við nýggju dátuverndarlógini verða grundleggandi krøvini til viðgerð og vernd av persónupplýsingum ikki broytt munandi. Markið ímillum dátuverndarlógina og hesa løgtingslógina verður eisini framhaldandi tað sama sum í dag.

Revsilógin
Revsilógin hevur ásetingar, sum kunnu fevna um yvirvøku við vakmyndatóli og víðarigeving av hesum upptøkum. Hesar reglur eru flestar í kapittul 27 um ónáðir og ærumeiðing.

§ 263, stk. 1, nr. 3 ásetur, at við sekt ella fongsli í upp til 6 mánaðir verður tann revsaður, sum av órøttum við tóli loyniliga avlurtar ella tekur upp útsagnir, sum verða sagdar í einrúmi, telefon ella í øðrum samrøðum millum onnur ella í samráðingum á afturlatnum fundi, sum viðkomandi ikki sjálvur luttekur á, ella sum hann av órøttum hevur skaffað sær atgongd til.

§ 264 a ásetur, at tann, sum av órøttum avmyndar persónar, sum eru á einum staði, har ikki er frítt at koma, verður revsaður við sekt ella fongsli í upp til 6 mánaðir.

Í § 264 d er ásett, at við sekt ella fongsli í upp til 6 mánaðir verður tann revsaður, sum av órøttum víðarigevur boð ella myndir, ið viðvíkja persónligum viðurskiftum hjá øðrum persóni ella aðramáta vísa hann í umstøðum, sum skilliga kunnu krevjast ikki at koma fyri almenningin.

Harumframt er eisini í § 232 í kapittul 24 um kynslig brotsverk áseting um blúnisbrot. Ásetingin ljóðar, at tann, sum fremur blúnisbrot, verður revsaður við sekt ella fongsli í upp til 2 ár. Er tann órættaði undir 15 ár, er revsingin sekt ella fongsul í upp til 4 ár. T.d. kann yvirvøka av skiftingarrúmum ella vesum verða fevnt av § 232.

Arbeiðsrættur
Afturat tí, sum greitt er frá omanfyri, kunnu tað verða reglur og grundreglur í arbeiðsrættinum, sum hava við sær avmarkingar í møguleikanum hjá serliga arbeiðsgevarum at yvirvaka starvsfólk, og har sum serlig fyrivarni tí skulu takast.

1.2.1. Lóggáva í øðrum londum
Í arbeiðinum at fyrireika eina nýggja løgtingslóg um yvirvøkua við vakmyndatóli hevur Løgmansskrivstovan kannað lóggávuna á økinum í okkara grannalondum, og londum vit vanliga samanbera okkum við.

Samanumtikið kann sigast, at lóggávan innihaldsliga er lík í okkara grannalondum og í høvuðsheitum byggir á somu yvirskipaðu viðurskifti og sjónarmið. Niðanfyri er ein yvirskipað gjøgnumgongd.

Danmark
Í Danmark er yvirvøka við vakmyndatóli regulerað í lov om tv-overvågning, sbrt. lovbekendtgørelse nr. 1190 frá 11. oktober 2007 við seinni broytingum. Hetta er sama lóg, sum varð sett í gildi í Føroyum í 1988, við seinni broytingum.

Lógin hevur í høvuðsheitum til endamáls at fyribyrgja lógarbrotum og at økja um tryggleikan í serliga útsettum bústaðarøkjum. Lógin hevur við sær, at tað í útgangsstøðinum er bannað privatum at yvirvaka á økjum við vanligari ferðslu. Privat kunnu tó yvirvaka á hesum økjum, um hetta er heimilað í lógini, t.d. á bensinstøðum og ídnaðarøkjum.

Almennir myndugleikar eru ikki fevndir av forboðnum ímóti at yvirvaka við vakmyndatóli. Almennir myndugleikar kunnu yvirvaka í tann mun hetta er innanfyri teir karmar, sum onnur lóggáva setur, undir hesum lóggávan um viðgerð av persónupplýsingum.

Lógin ásetur krav um, at bæði privat og almennir myndugleikar skulu skelta við yvirvøku við vakmyndatóli.

Umframt lov om tv-overvågning skulu reglurnar um viðgerð av persónupplýsingum (ES-fyriskipanin GDPR) fylgjast, tá tað verður yvirvakt við vakmyndatóli

Svøríki
Galdandi lóg um yvirvøku við vakmyndatóli kom í gildi 1. august 2018. Lóggávan á økinum varð endurskoðað í sambandi við gildiskomuna av ES-fyriskipanini um vernd av persónupplýsingum (GDPR) 25. mai 2018.

Lógin skilir ímillum privat og myndugleikar (ella tann, sum útinnir eina uppgávu av almennum áhuga sambært lóggávu).

Privat kunnu yvirvaka við vakmyndatóli innanfyri teir karmar, sum GDPR og onnur viðkomandi lóggáva setur, og kunnu yvirvaka uttan at søkja um loyvi. Hetta ger, at tann privati dátuábyrgdarin skal viga egin áhugamál í viðgerð av persónupplýsingum upp ímóti áhuganum hjá tí einstaka ikki at vera fyri yvirvøku. Henda ítøkiliga metingin hevur aloftast við sær, at privat *ikki* kunnu yvirvaka á almennum støðum.

Myndugleikar og onnur, sum útinna eina uppgávu av almennum áhuga, skulu í útgangsstøðinum søkja dátueftirlitið um loyvi, áðrenn yvirvøka av støðum, sum

almenningurin hevur atgongd til, kann fara fram. Loyvi krevst ikki at yvirvaka støð, sum ikki eru alment atkomulig. Loyvi verður givið, um áhugin í at yvirvaka vigar tyngri enn áhugin hjá tí einstaka í ikki at vera fyri yvirvøku. Strandarverjan, politiið, fregnartænastan og tollmyndugleikin eru í ávísan mun undantikin frá kravinum um loyvi.

Ísland
Í Íslandi er eingin lóg um yvirvøku við vakmyndatóli. Yvirvøka er tó ítøkiliga nevnd í lógini, sum gjøgnumførir dátuverndarfyriskipanina GDPR í íslendskan rætt. Í lógini er m.a. gjørt greitt, at yvirvøka einans kann fara fram, um sakligar orsakir eru til tess, og eisini eru serligar reglur um, nær upplýsingar kunnu gevast víðari.

Yvirvøka krevur ikki loyvi, men ásett er í lógini, at dátueftirlitið ger nærri vegleiðing um nýtslu av vakmyndatóli.

Norra
Í Norra er heldur eingin lóg um yvirvøku við vakmyndatóli. Yvirvøka kann sostatt fara fram, um treytirnar í dátuverndarlóggávuni eru loknar. Eins og Ísland hevur Norra sum EBS-land gjøgnumført dátuverndarfyriskipanina GDPR. Tað krevst ikki loyvi at yvirvaka við vakmyndatóli.

Vegleiðing frá Evropeiska Dátuverndarráðnum
Evropeiska Dátuverndarráðið (EDPB), sum er stovnað við heimild í GDPR, er samansett av leiðandi starvsfólkum fyri dátueftirlitini í ES-limalondunum. EDPB hevur m.a. til uppgávu at gera vegleiðingar o.a. til GDPR, undir hesum um viðgerð av persónupplýsingum.

EDPB samtykti 29. januar 2020 leiðreglur fyri viðgerð av persónupplýsingum við vakmyndatóli (Guideline 3/2019 on processing of personal data through video devices). Leiðreglurnar taka útgangsstøðið í, hvussu yvirvøka við vakmyndatóli kann fara fram, um ongar nationalar serreglur eru, t.e. at viðgerðin einans er fevnd av reglunum í GDPR.

Leiðreglurnar gjøgnumganga viðgerðargrundarløg, sum kunnu lýsa, hvussu rættindini hjá skrásettum skulu skiljast í hesum høpi, og hvørji trygdartiltøk skulu setast í verk í sambandi við yvirvøku við vakmyndatóli.

Bæði almennir myndugleikar og privat kunnu sambært GDPR uttan loyvi frá einum dátueftirliti viðgera persónupplýsingar í sambandi við yvirvøku við vakmyndatóli.

Fyri *privat* er viðgerðargrundarlagið artikul 6, stk. 1, litra f. At brúka hetta viðgerðargrundarlagið krevur eina ítøkiliga meting í hvørjum einstøkum føri, og tað er altíð ein fortreyt, at onnur minni inntrívandi tiltøk verða sett í verk fyrst/í staðin. Privat kunnu vanliga ikki yvirvaka á almennum støðum. Viðgerðargrundarlagið fyri *almennar myndugleikar* er § 6, stk. 1, litra e (at røkja samfelags áhugamál ella útinnan av almennum myndugleika ella uppgávu).

Umframt viðgerðargrundarlag skal viðgerðin av persónupplýsingum við vakmyndatóli altíð lúka meginreglurnar fyri viðgerð av persónupplýsingum, t.e. viðgerðin skal verða saklig, proportional, verða til nágreiniliga tilskilað endamál o.s.fr., eins og krøvini um viðgerðartrygd skulu vera fylgd.

1.3. Endamálið við uppskotinum

Endamálið við uppskotinum er at tryggja eina dagførda og tíðarhóskandi løgtingslóg um at yvirvaka við vakmyndatóli, sum tekur atlit til rættin hjá persónum ikki at vera fyri óneyðugari og inntrívandi privatari yvirvøku í almenna rúminum, samstundis sum neyðug atlit verða tikin til, at tað í ávísum førum kann verða neyðugt at yvirvaka m.a. fyri at økja um tryggleikan og fyri at fyribyrgja lógarbrotum.

1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum

Lógaruppskotið byggir í høvuðsheitum á sama leist, sum galdandi lóg um forbud mod privates TV-overvågning m.v.

Tað er umráðandi at hava fyri eyga, at løgtingslógin – verður hon samtykt – ikki fer at standa einsamøll, men fer saman við lóggávuni, sum nevnt er omanfyri undir pkt. 1.2., undir hesum serliga dátuverndarlógini, at regulera yvirvøkuøkið. Tað er sostatt umráðandi, tá støða skal takast til, um vakmyndatól skal setast upp, at geva sær far um, at løgtingslógin um yvirvøku við vakmyndatóli er partur av eini størri heild.

Í skipanini við yvirvøku við vakmyndatóli, sum lagt verður upp til, kann skiljast ímillum øki við vanligari ferðslu, øki, sum vanlig atgongd er til og privat øki. Harumframt kann skiljast ímillum, um tann, sum yvirvakir, er privatur partur ella almennur myndugleiki.

Uppskotið, undir hesum samanhangurin við aðra lóggávu, kann í høvuðsheitum lýsast á henda hátt:



1.4.1. Øki við vanligari ferðslu (alment øki)

Tað er lagt upp til, at tað framhaldandi í løgtingslóg um at yvirvaka við vakmyndatóli í útgangsstøðinum skal vera eitt forboð fyri, at *privat* yvirvaka við vakmyndatóli á øki við vanligari ferðslu. Mett verður, at tað ikki er ein privat uppgáva at syrgja fyri tryggleika ella at fyribyrgja lógarbrotum á almennum øki, samstundis sum yvirvøka við vakmyndatóli kann verða inntrívandi fyri persónliga frælsið hjá tí einstaka og tí eigur at fara fram undir skipaðum viðurskiftum.

Hetta ger, at lógaruppskotið bannar privatari yvirvøku við vakmyndatóli á øki við vanligari ferðslu (t.e. gøtu, veg, pláss ella líknandi øki, sum verður nýtt til vanliga ferðslu).

Frá hesum útgangsstøðinum um forboð verða ásett nøkur undantøk, har tað verður mett neyðugt, at privat yvirvaka almenn øki. Hetta kann t.d. vera yvirvøka, sum er neyðug við tí endamáli at fyribyrgja ella avdúka lógarbrot, sum ávís privat, undir hesum peningarstovnar, bensinstøðir og handlar, eru serliga útsett fyri, og sum tað tí er ein serligur tørvur at halda eyga við.

Almennir myndugleikar eru ikki fevndir av forboðnum fyri yvirvøku av øki við vanligari ferðslu í hesum uppskoti. Hvørt almennir myndugleikar kunnu yvirvaka almenn øki, skal metast eftir øðrum reglum, sum eru galdandi fyri almennar myndugleikar, undir hesum serliga dátuverndarlógini, sum setur eitt alment krav um sakligheit og proportionalitet, og almenni fyrisitingarrætturin, sum eisini ásetur, hvussu ein almennur myndugleiki kann virka.

Bæði privat og almennir myndugleikar skulu skelta, um yvirvøka fer fram á øki við vanligari ferðslu.

1.4.2. Øki, sum vanlig atgongd er til
Hetta lógaruppskotið bannar ikki yvirvøku á økjum, sum vanlig atgongd er til (t.e. støð ella høli, sum vanlig atgongd er til). Hetta er t.d. inni í handlum, peningastovnum ella móttøkuhølum.

Hetta ger, at privat og almennir myndugleikar kunnu yvirvaka á hesum økjum, um hetta er innanfyri reglurnar í t.d. dátuverndarlógini, revsilógini, í fyrisitingarrættinum og í arbeiðsrættinum.

Bæði privat og almennir myndugleikar skulu sambært hesum uppskoti skelta, um yvirvøka fer fram. Hetta tryggjar gjøgnumskygni og gevur tí einstaka møguleika at umganga støð, sum eru yvirvakt, ella í øllum førum at tillaga atferðina.

1.4.3. Privat øki
Hetta lógaruppskotið bannar ella avmarkar heldur ikki yvirvøku á privatum øki, t.d. í egnum húsi ella inni á egnum matrikuli. Um yvirvøka av privatum øki fer fram, skal tó ansast eftir, at vakmyndatóli ikki yvirvakir partar av almennum øki, sbr. omanfyri.

Yvirvøka av privatum øki kann í fleiri førum fara fram, tó skal ein vera serliga varug við dátuverndarlógina og revsilógina, sum kunnu hava við sær avmarkingar.

1.4.4. Nýggj tøkni
Lógaruppskotið fevnir um vakmyndatól, myndatól ella líknandi tól, sum skipað ella regluliga endurtakandi kunnu yvirvaka persónar. Henda orðingin er breið og fevnir sostatt í útgangsstøðinum um øll tól, sum kunnu yvirvaka á nevnda hátt, undir hesum eisini vevmyndatól.

Hóast orðingin er breið er umráðandi at geva sær fær um, at vakmyndatól í dag ofta hava aðrar innbygdar møguleikar enn at taka upp. Tað er sostatt møguligt, at vakmyndatól hava funktiónir, sum eru tengdar at t.d. eftirgjørdum viti (dk: kunstig intelligens, en: artificial intelligence) ella andlitsafturkenning.

Hetta lógaruppskotið setur ikki alment forboð fyri slíkum funktiónum.
Sjálvt um hetta lógaruppskotið ikki setur eitt alment forboð fyri nevndu funktiónunum, er umráðandi at vera varugur við aðra lóggávu, undir hesum serliga dátuverndarlógina, sum kemur í gildi 1. januar 2021, um ein ætlar at nýta slíkar funktiónir í sambandi við yvirvøku, sum lógliga kann fara fram. Skulu slíkar funktiónir nýtast kann tað vera serliga viðkomandi at gera sær greitt um t.d. meginreglurnar um viðgerð av persónupplýsingum eru loknar, undir hesum serliga kravið um proportionalitet. Eisini er umráðandi at verða varugur við, at biometriskar dátur eru at rokna sum viðkvæmar persónupplýsingar, og at reglurnar um viðgerð tí eru serliga strangar. Harumframt eru ásetingar í dátuverndarlógini um avleiðingargreining um dátuvernd, sum kunnu vera serliga viðkomandi í hesum samanhangi.

1.4.5. Loyvi til yvirvøku við vakmyndatóli
Við uppskotinum er ikki lagt upp til eina loyvisskipan í sambandi við yvirvøku við vakmyndatóli. Ein privatur partur kann tí – í tann mun tað er innanfyri teir karmar, sum eru í § 3 í uppskotinum – yvirvaka við vakmyndatóli uttan loyvi frammanundan. Almennir myndugleikar kunnu eisini uttan loyvi yvirvaka við vakmyndatóli, um hetta er innan fyri reglurnar í m.a. dátuverndarlógini.

Lagt er upp til, at øll vakmyndatól skulu fráboðast Dátueftirlitinum, sum førir eina skrá yvir vakmyndatól.

Av tí, at tað kunnu vera føri, tá tað er eitt neyðugt og hent amboð at yvirvaka, verður lagt upp til, at politiið í samráð við landsstýrismannin eftir umsókn kann geva privatum loyvi til yvirvøku, sum ikki er heimilað í § 3. Henda serliga loyvisskipanin kemur sostatt afturat vanligu skipanini, sum tað ikki krevst loyvi til.

1.5. Ummæli og ummælisskjal
Í arbeiðnum við dagføring av lógini hevur Løgmansskrivstovan havt fundir við viðkomandi partar til tess at skilja, hvørjar dagføringar eru fyri neyðini og hvønn tørv ymisku partarnir síggja.

Lógaruppskotið hevur verið til ummælis hjá Almannamálaráðnum, Heilsumálaráðnum, Uttanríkis- og mentamálaráðnum, Umhvørvis- og vinnumálaráðnum, Fíggjarmálaráðnum, Fiskimálaráðnum, Dátueftirlitinum, Tórshavnar Kommunu, Klaksvíkar Kommunu, Kommunufelagnum, Vinnuhúsinum, Føroya Tele, Hey, SPEKT, Formula, Januar, Elektron, Trygdartøkni, Tunnil, Vága Floghavn, Atlantic Airways, Bank Nordik, Betri, Norðoyar Sparikassa, Suðuroyar Sparikassa, Føroya Politi og Føroya Rætti.

Lógaruppskotið hevur harumframt ligið á ummælisportalinum hjá Føroya landsstýri.

Hesi hava svarað: Almannamálaráðið, Heilsumálaráðið, Uttanríkis- og mentamálaráðið, Umhvørvis- og vinnumálaráðið, Fiskimálaráðið, Dátueftirlitið, Kommunufelagið, Vinnuhúsið, Elektron, Trygdartøkni, Atlantic Airways, Bank Nordik, Betri og Føroya Politi.

Ummælisskjal er lagt við sum fylgiskjal 1.

Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Lógaruppskotið hevur ikki við sær fíggjarligar avleiðingar fyri land ella kommunur.

2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Lógaruppskotið hevur við sær, at Dátueftirlitið skal føra eina skrá yvir vakmyndatól, sbrt. § 9, stk. 2. Hetta kann hava við sær umsitingarligar avleiðingar fyri Dátueftirlitið, serliga í skiftistíðini til 1. juli 2021, sbr. § 11, stk. 2.

Lógaruppskotið hevur ikki aðrar umsitingarligar avleiðingar fyri land ella kommunur.

2.3. Avleiðingar fyri vinnuna
Lógaruppskotið hevur við sær, at reglurnar um yvirvøku við vakmyndatóli verða dagførdar, so at tær í størri mun eru í samsvari við tørvin í vinnuni. Dagførdar og greiðari reglur eru vinnuni til fyrimuns.

Uppskotið hevur m.a. reglur um upplýsing í sambandi við yvirvøku á arbeiðsplássum, sum kann hava við sær umsitingarligar avleiðingar fyri vinnuna. Harafturat er ásett, at øll vakmyndatól skulu fráboðast Dátueftirlitinum.

2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið
Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri umhvørvið.

2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum
Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri serlig øki í landinum.

2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir
Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir.

2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum
Tað eru ikki millumtjóðasáttmálar á økinum, ið lógaruppskotið fevnir um, og sum Føroyar hava skyldu at fylgja.

2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar

1) **Hoyvíkssáttmálin**
   Hoyvíkssáttmálin er ikki viðkomandi fyri lógaruppskotið, sum ikki ávirkar samhandilin o.tíl. millum Føroyar og Ísland.

2) **Evropeiski mannarættindasáttmálan, EMRS**
   Lógaruppskotið er í samsvari við EMRS.

   Sambært grein 8 í EMRS hava øll rætt til, at privatlív og familjulív verða vird.

   Løgtingslógaruppskotið hevur við sær, at tað í ávísum førum verður heimilað privatum at yvirvaka við vakmyndatóli á almennum støðum. Mett verður tó, at orsøkin til yvirvøkuna (m.a. fyribyrging av lógarbrotum og tryggleiki) og kravið um skelting hava við sær, at í tann mun yvirvøka verður mett sum eitt inntriv í rættin til privatlív, er hetta eitt inntriv, sum er sakligt og lýkur lutfalsmeginregluna, og sum verður mett neyðugt.

3) **Sáttmáli Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek**
   Lógaruppskotið er í samsvari við sáttmálan.

2.9. Markaforðingar
Tað eru ikki kendar markaforðingar á økinum, og mett verður, at uppskotið ikki kann elva til slíkar forðingar.

2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv
Lagt verður upp til, at brot á ávísar ásetingar í løgtingslógini – eins og í dag – kunnu revsast við sekt.
Eisini er serlig áseting um, at í málum um brot á løgtingslógina kann húsarannsókn fara fram eftir retsplejelov for Færøerne, sum annars setur krav um, at lógarbrot skal hava við sær fongsulsrevsing, áðrenn húsarannsókn kann verða framd. Orsøkin er, at tað í fleiri førum um brot á hesa løgtingslóg kann verða neyðugt at fáa fatur á tekniskari útgerð (teldum, yvirvøkutóli o.s.fr.), sum er nýtt til brotið.

2.11. Skattir og avgjøld
Lógaruppskotið hevur ikki reglur um skattir ella avgjøld.

2.12. Gjøld
Lógaruppskotið hevur ikki reglur um gjøld.

2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?
Í § 9, stk. 2 er álagt teimum, sum seta upp vakmyndatól at boða Dátueftirlitinum frá. Manglandi fráboðan kann verða revsað við sekt.

2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?
Sambært § 4, stk. 1 kann politiið í serligum førum í samráð við landsstýrismannin eftir umsókn geva loyvi til uppseting av vakmyndatólum. Sambært § 4, stk. 2 eru avgerðirnar hjá politiinum endaligar innan fyrisitingina og kunnu tí ikki kærast til annan fyrisitingarligan myndugleika.

Sambært § 7, stk. 3, kann landsstýrismaðurin áseta nærri reglur um skelting.

2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?
Lógaruppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn.

Viðmerkjast skal tó, at sambært § 10, stk. 6 í lógaruppskotinum kunnu reglurnar um húsarannsókn í rættargangslógini fyri Føroyar nýtast samsvarandi í sambandi við brot á hesa løgtingslóg. Sambært reglunum um húsarannsókn í rættargangslógini er tað í útgangsstøðinum krav, at brotið kann hava við sær frælsisrevsing, um húsarannsókn skal kunna fara fram.

Tað er politiið, sum fremur húsarannsókn eftir rættargangslógini. Húsarannsóknin krevur í útgangsstøðinum rættarúrskurð, og ásetingin í hesum lógaruppskoti broytir ikki hetta.

Orsøkin til, at tað er lagt upp til, at húsarannsókn kann nýtast í málum um brot á hesa løgtingslóg, sjálvt um brot á lógina einans hava við sær sekt, er, at tað í slíkum málum kann verða serliga neyðugt at fáa fatur á útgerðini, sum er nýtt til brotið.

2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?

Ein dagføring og nútímansgerð av reglunum um at yvirvaka við vakmyndatóli er – saman við dátuverndarlógini, sum eisini kemur í gildi 1. januar 2021 – við til at betra um verndina av persónliga frælsinum hjá tí einstaka.

Lógaruppskotið hevur ikki aðrar avleiðingar.

2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum

	Fyri landið ella landsmyndug-leikar	Fyri kommunalar myndugleikar	Fyri pláss ella øki í landinum	Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir	Fyri vinnuna
Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Umsitingarligar avleiðingar	Ja	Nei	Nei	Nei	Ja
Umhvørvisligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Sosialar avleiðingar			Nei	Nei	

Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

Til § 1
Í *stk. 1* verður lagt upp til eina allýsing av, hvussu yvirvøka við vakmyndatóli, sum er fevnt av hesi løgtingslóg, skal skiljast. Talan er í høvuðsheitum um eina føroyskan av allýsingini í galdandi lóg.

Tað eru tríggjar treytir, sum skulu vera loknar, fyri at talan er um yvirvøku, sum er fevnd av løgtingslógini.

Fyri tað fyrsta skal talan vera um yvirvøku, sum er rættað ímóti persónum. Tað merkir, at orsøkin til at yvirvaka er at hava eftirlit við persónum og teirra atferð. Hvat undirliggjandi endamálið við yvirvøkuni – og harvið eftirlitinum – er, er ikki avgerandi. Tað hevur við sær, at løgtingslógin ikki bara fevnir um yvirvøku, sum hevur til endamáls at fyribyrgja lógarbrotum, men eisini yvirvøku, sum hevur annað endamál, t.d. trygd ella sosialt kontrol.

At yvirvøkan skal verða rættað ímóti persónum hevur við sær, at yvirvøka, sum er rættað ímóti tólum, bygningum ella djórum ikki er fevnt av forboðnum. Hetta er tí, at tað ikki er tørvur á vernd av privatlívi í hesum førum. Henda avmarking hevur tó ikki við sær, at tað er krav, at persónar eru á upptøkunum alla tíð. T.e. eisini yvirvøka, har persónar bara eru á upptøkunum av og á, er fevnt av allýsingini.

Fyri tað annað skal talan vera um eitt tól – vakmyndatól, myndatól ella líknandi – sum er fjarstýrt ella sjálvvirkandi.

Hetta ger, at t.d. hondhildin tól, sum eru stýrd á staðnum, ikki eru fevnd. Hetta kann t.d. vera upptøkur, sum privatpersónur ger á síni telefon. Orsøkin er m.a. at tað er lættari hjá tí einstaka at verja seg fyri slíkum upptøkum, eins og tað hevði verið torført at handhevja eitt slíkt forboð. Sjálvt um slíkar upptøkur ikki eru fevndar av hesi løgtingslóg, kunnu tær, serliga í mun til víðarigeving, verða fevndar av aðrari lóggávu.

Sløg av tólum er ikki úttømandi nevnt í ásetingini, sbr. *"ella líknandi"*. Hetta m.a. fyri at tryggja, at løgtingslógin fylgir við tøkniligu menningini.

Fyri tað triðja skal yvirvøkan vera skipað ella regluliga endurtakandi. Hesin partur av allýsingini hevur við sær, at nýtsla í einstøkum førum ella tilvildarlig nýtsla av nevndu tólum ikki er fevnd av forboðnum.

Henda treytin hevur ikki við sær, at upptøkurnar skulu verða áhaldandi (kontinuerligar). Tað merkir, at eisini vakmyndatól, sum taka upp sjálvvirkandi, hvørja fer onkur gongur framvið, eru fevnd, tí hetta er bæði skipað og regluliga endurtakandi. Upptøka, sum fer í gongd, tá trýst verður á ein alarm-knøtt er hinvegin ikki fevnd, av tí, at slík upptøka ikki er skipað ella regluliga endurtakandi, men heldur ber brá av at vera tilvildarlig.

Í *stk. 2* er lagt upp til, at ásetingarnar um yvirvøku við vakmyndatóli eisini eru galdandi, tá fevndu tólini verða sett upp. Talan er um eina prógvtekniska áseting, sum hevur við sær, at gerningsløtan revsirættarliga verður flutt fram í tíð. Hetta ger, at tað ikki er neyðugt, at

vakmyndatólið er sett til og tekur upp, fyri at løgtingslógin verður brotin. Tað er sostatt nóg mikið, at vakmyndatólið verður sett upp.

Til § 2
Í *§ 2* er lagt upp til at føra § 1, stk. 1 í galdandi lóg víðari, soleiðis at tað í útgangsstøðinum er bannað privatum at yvirvaka gøtu, veg, pláss ella líknandi øki, sum verður nýtt til vanliga ferðslu.

Privat er her at skilja sum bæði privatpersónar og privatir løgfrøðiligir persónar so sum privatar fyritøkur, feløg o.a.

Øki, sum privat ikki hava loyvi at yvirvaka, eru øki, sum verða nýtt til vanliga ferðslu. Hetta fevnir um almenn øki, t.e. øki, sum ein og hvør frítt hevur atgongd til og kann vera á, og har ein í útgangsstøðinum kann ganga út frá, at tað er møguligt at vera uttan at vera fyri yvirvøku.

Lýsingin av støðum, sum tað er bannað at yvirvaka í § 2, er tann sama, sum er í galdandi áseting, og tað avgerandi er, um talan er um øki, sum verða nýtt til *vanliga ferðslu*. Hetta skal skiljast á sama hátt, sum lýsingin í ferðslulógini, og í samsvari við siðvenjuna á tí økinum, og avgerandi er sostatt ikki, um gøtan o.s.fr. er almenn ella privat, men um hon verður nýtt til vanliga ferðslu.

Til § 3
Í § 3 eru ásett undantøk frá forboðnum í § 2 móti privatari yvirvøku. Mett verður sostatt, at tað í serligum førum eru haldgóðar orsakir til, at privat í avmarkaðan mun yvirvaka gøtu, veg, pláss ella líknandi øki, sum verður nýtt til vanliga ferðslu, og har sum fólk uttan forðingar kunnu vera.

§ 3, nr. 1 førir víðari § 2, nr. 1 í galdandi lóg, og ásetur, at bannið í § 2 ikki er galdandi fyri yvirvøku av bensinstøðum, ídnaðarvirkjum, innilokaðum handilsmiðstøðum og líknandi økjum, har vinnuligt virksemi fer fram, um tann, sum hevur ræði á økinum, stendur fyri yvirvøkuni.

Tað er ein fortreyt fyri yvirvøkuni, at tað er tann, sum hevur ræði á økinum, sum stendur fyri yvirvøkuni. Hetta kann vera eigarin, men kann eisini vera leigarin.

Tað eru einans nevndu økini, sum kunnu yvirvakast, t.e. at tað í útgangsstøðinum ikki er loyvt at yvirvaka á ein slíkan hátt, at upptøkur verða gjørdar av almennum øki, sum liggur upp at nevndu økjunum. Tað merkir, at stk. 3, nr. 1 ikki heimilar, at yvirvøkutóli á t.d. eini bensinstøð taka upp út á veg við vanligari ferðslu.

Sambært *§ 3, nr. 2* verður yvirvøka loyvd á vegi o.a. við vanligari ferðslu, um yvirvøkan er við peningasjálvtøkur o.tíl ella bilar, sum einans verða nýttir til flutning av peningi, um tann, sum hevur ræði á sjálvtøkuni ella bilinum, stendur fyri yvirvøkuni, og yvirvøkan einans er rættað móti persónum, sum eru beint við sjálvtøkuna ella bilin.

Ásetingin gevur møguleika fyri yvirvøku í tveimum førum, sum eru felags á tann hátt, at tey hava við reiðan pening at gera. Ásetingin er tí serliga – og kanska einans – viðkomandi fyri peningastovnar. Av tí at handfaring av reiðum peningi fer fram, er møguleikin fyri lógarbrotum størri enn aðrastaðni, og tí verður vikið frá forboðnum í § 2.

Í *§ 3, nr. 3* er lagt upp til at heimila peningastovum o.tíl., gistingarhúsum, matstovum, handilsmiðstøðum og handlum, har sum smásøla fer fram, at yvirvaka við vakmyndatóli á almennum øki, sum liggur uppat nevndu fyritøkum. Eisini henda ásetingin hevur serliga til endamáls at fyribyrgja og avdúka lógarbrot.

Tí verður ásett, at nevndu støð kunnu yvirvaka egnar inngongdir, framsíðu og baksíðu (nr. 3, litra a), og harumframt kunnu yvirvaka á økjum, sum eru beinleiðis knýtt at egnum inngongdum, framsíðu ella baksíðu, og sum natúrliga verða nýtt ella kunna nýtast sum atgongd ella rýmingarleið, um yvirvøkan greitt er neyðug til tess at fyribyrgja lógarbrotum (nr. 3, litra b).

Uppreksanin av fyritøkum, sum kunnu yvirvaka sbrt. § 3, nr. 3 er úttømandi.

Av tí at økið við vanligari ferðslu, sum privat kunnu yvirvaka, verður víðkað, sbr. § 3, nr. 1 og 2, eru treytirnar fyri yvirvøku í § 3, nr. 3 eisini strangari. Tað er sostatt í øllum førum ein fortreyt, at vakmyndatólini eru stillað soleiðis at tey einans er rættað ímóti persónum, sum eru beint við inngongdirnar o.s.fr.

Um fyritøkan skal yvirvaka meira enn egnar inngongdir, framsíðu og baksíðu, sbr. nr. 3, litra a, er tað sbrt. nr. 3, litra b treytað av, at yvirvakt øki natúrliga verða nýtt ella kunna nýtast sum atgongd ella rýmingarleið, og at yvirvøkan greitt er neyðug til tess at fyribyrgja lógarbrotum. Virkisøkið fyri § 3, nr. 3, litra b er snævurt.

Í *§ 3, nr. 4* er lagt upp til, at privat kunnu yvirvaka í tunlum, undir hesum á gjaldsstøðum við tunnilsmunnar og á innkoyringarvegum, til tess at økja um trygdina ella til tess at krevja gjald um tann, sum hevur ábyrgdina av trygdini ella gjaldsskipanini stendur fyri yvirvøkuni.

Orsøkin til hesa áseting er, at tað í ávísum tunlum, serliga undirsjóvartunlum og øðrum longum tunlum, er neyðugt av trygdarorsøkum at hava yvirvøku. Tunlar í Føroyum eru ofta skipaðir sum almenn partafeløg, og tí kann ivi standast um, hvørt hesi feløg eru at rokna sum almennur myndugleiki ella ikki í sambandi við yvirvøku. Fyri at eingin ivi skal vera um, at yvirvøka av trygdarávum kann fara fram, er ásetingin í § 3, nr. 4 við í uppskotinum. Ásetingin heimilar eisini yvirvøku í sambandi við gjaldsskipanina.

Tað skal viðmerkjast, at Fíggjarmálaráðið 6. mars 2020 setti fram uppskot til løgtingslóg um vakmyndatól í undirsjóvartunlunum og um rætt hjá tunnilsfeløgunum at fáa elektroniskar stakupplýsingar úr akfarsskránni hjá Akstovuni (løgtingsmál 86/2019). Vegna serligu støðuna við COVID-19 boðaði løgtingsformaðurin á tingfundi 4. juni 2020 frá, at landsstýrismaðurin í fíggjarmálum tók uppskotið aftur. Endamálið við uppskotinum var lutvíst tað sama, sum nú er skotið upp í § 3, nr. 4.

Í § 3, nr. 5 er ásett, at privat kunnu yvirvaka við vakmyndatóli, um yvirvøkan ikki verður tikin upp á video, film o.tíl., tá talan er um yvirvøku av egnum inngongdum, framsíðu, baksíðu, girðing ella líknandi.

Ásetingin førir § 2, nr. 2 í galdandi lóg víðari.

Ásetingin er ikki avmarkað til serligar fyritøkur, og økið, sum kann yvirvakast, er eisini víðari enn í hinum ásetingunum. Orsøkin til hesa breiðu heimildina er, at teir vandar fyri óneyðugum inntrivi í frælsið hjá tí einstaka, sum gera seg galdandi, tá viðkomandi er fyri

yvirvøku, í minni mun gera seg galdandi, tá yvirvøkan ikki verður tikin upp. Tað er tó framhaldandi talan um yvirvøku, og tí er møguleikin hjá tí privata at fremja hesa yvirvøku ikki óavmarkaður.

Til § 4

Í *stk. 1* er lagt upp til eina serliga loyvisskipan, sum skal tryggja, at tað í undantaksførum, tá tað verður mett politifakliga neyðugt við yvirvøku við vakmyndatóli, kann verða givið privatum undantak frá banninum í § 2 at yvirvaka øki við vanligari ferðslu, hóast hetta ikki er ásett í § 3.

Lagt verður upp til, at politiið í samráð við landsstýrismannin í serligum førum eftir umsókn kann geva privatum loyvi til at yvirvaka, um hetta verður mett neyðugt til tess at fyribyrgja lógarbrotum.

Orsøkin til, at tað er politiið, sum kann geva loyvið er, at avgerðin skal verða grundað á eina politifakliga meting av, um vakmyndatól ítøkiliga kunnu virka kriminalitetsfyribyrgjandi. Ásetingin skal tulkast restriktivt, og loyvi skal bara verða givið í undantaksførum. Hugsað verður t.d. um, at politiið kann geva privatum loyvi at yvirvaka almenn øki framman fyri størri ítróttarstøð um nógv fólk savnast.

Lagt er upp til, at politiið kann geva fyritøkum, feløgum o.ø. loyvi. Við hesi orðing er lagt upp til, at loyvi í útgangsstøðinum ikki kann verða givið privatpersónum til egna ogn.

Í avgerðini tekur politiið m.a. støði í møguligum vandastøðum, sum kunnu koma í, tørvinum á kriminalitetsfyribyrgjandi yvirvøku og møguligum ítøkiligum fyrimunum fyri politiið í eini seinni kanning av lógarbrotum. Av tí, at avgerðin harumframt m.a. skal taka atlit til vernd av persónupplýsingum og persónliga frælsið hjá tí einstaka, skal avgerðin hjá politiinum takast í samráð við landsstýrismannin. Hetta merkir ítøkiliga, at politiið skal biðja um ummæli frá landsstýrismanninum, áðrenn avgerð verður tikin. Landsstýrismaðurin kann í síni viðgerð av málinum m.a. heita á Dátueftirlitið um ummæli.

Politiið kann seta treytir í loyvið. Tað kann t.d. verða um, hvar tólini skulu vera, og nær tey kunnu taka upp. Loyvið kann ikki hava longri gildistíð enn 2 ár.

Vanligu reglurnar í dátuverndarlógini, t.e. løgtingslóg nr. 80 frá 7. juni 2020 um vernd av persónupplýsingum, um viðgerð av persónupplýsingum, undir hesum um viðgerðartrygd o.s.fr. eru altíð galdandi.

Sambært *stk. 2* eru avgerðir hjá politiinum endaligar innan fyrisitingina. Avgerðirnar kunnu tí ikki kærast til annan fyrisitingarligan myndugleika.

Til § 5

Í § 5 verður gjørt greitt – sum tað eisini er greitt frá undir pkt. 1.4. í almennu viðmerkingunum – at í tann mun persónupplýsingar verða viðgjørdar í sambandi við yvirvøku við vakmyndatóli, sum privat standa fyri, sbrt. §§ 3 og 4, er løgtingslóg um vernd av persónupplýsingum galdandi.

Ásetingin er fyrst og fremst ein áminning um, at tá persónupplýsingar verða viðgjørdar – eisini tá hetta er í samband við yvirvøku við vakmyndatóli – tá er dátuverndarlógin galdandi. Dátuverndarlógin ásetur m.a. meginreglur fyri viðgerð av persónupplýsingum, t.d. krav um

sakligheit og proportionalitet, og reglur um viðgerðartrygd, sum eisini skulu verða loknar, tá yvirvøka fer fram.

Til § 6
Hetta uppskotið til løgtingslóg um at yvirvaka við vakmyndatóli inniheldur ikki forboð fyri, at almennir myndugleikar yvirvaka við vakmyndatóli og ásetur eiheldur, *nær* almennir myndugleikar kunnu yvirvaka.

Hetta merkir tó ikki, at almennir myndugleikar uttan víðari kunnu yvirvaka við vakmyndatóli. Tí er tað í § 6 gjørt greitt – sum tað eisini er greitt frá undir pkt. 1.4. í almennu viðmerkingunum – at í tann mun persónupplýsingar verða viðgjørdar í sambandi við yvirvøku við vakmyndatóli, sum almennur myndugleiki stendur fyri, er løgtingslóg um vernd av persónupplýsingum galdandi

Ásetingin í § 6 er sostatt fyrst og fremst ein áminning um, at tá persónupplýsingar verða viðgjørdar – eisini tá hetta er í samband við yvirvøku við vakmyndatóli, sum almennir myndugleikar standa fyri – tá er dátuverndarlógin galdandi. Dátuverndarlógin ásetur m.a. meginreglur fyri viðgerð av persónupplýsingum, t.d. krav um sakligheit og proportionalitet, og reglur um viðgerðartrygd, sum eisini skulu verða loknar, tá yvirvøka fer fram.

Til § 7
Í § 7 er lagt upp til eina áseting um skelting, sum í høvuðsheitum førir víðari galdandi rætt.

Í *stk. 1* er lagt upp til ein almenna kunningarskyldu, sum hevur við sær, at bæði privat og almennir myndugleikar, sum yvirvaka støð ella høli, sum vanlig atgongd er til, skulu skelta ella á annan líknandi hátt týðiliga gera vart við yvirvøkuna.

Henda áseting hevur við sær, at tað í sambandi við alla lógliga yvirvøku skal skeltast. Hetta fevnir bæði um yvirvøku, sum er fevnd av § 3, men eisini um yvirvøku av øðrum hølum og støðum sum vanlig atgongd er til, sum t.d. handlar.

Orsøkin til kunningarskylduna er, at tað skal verða møguligt hjá persónum at velja støð við yvirvøku frá ella í øllum førum at tillaga atferðina.

Støð og høli fevnd av stk. 1 skal skiljast í samsvari við § 3, stk. 1 í politiviðtøkunum fyri Tórshavn og fevnir um – umframt tað, sum er fevnt av § 3 – t.d. handlar, móttøkuhøli, farstøðir og stuttleikastøð, sum vanlig atgongd er til.

Í stk. 1 er harumframt ásett, at tað eisini skal skeltast ella á annan líknandi hátt týðiliga skal gerast vart við yvirvøku á arbeiðsplássum. Hetta tryggjar m.a., at tað ikki er møguligt hjá einum arbeiðsgevara loyniliga at yvirvaka starvsfólk. Ásetingin um arbeiðspláss hevur serliga týdning fyri tey arbeiðspláss, sum ikki øll hava atgongd til. Fevnd eru øll støð, har sum arbeiði verður gjørt fyri ein likamligan ella løgfrøðiligan persón.

Tá vakmyndatól verða sett upp á arbeiðsplássum, skal arbeiðsgevarin vera serliga varugur við, at tað kunnu verða reglur innanfyri tað arbeiðsrættarliga økið, sum kunnu hava við sær avmarkingar.

Í *stk. 2* er tað lagt upp til, at kravið um skelting ella aðra kunning ikki er galdandi fyri yvirvøku av bilum, sum einans verða nýttir til flutning av peningi, sbrt. § 3, nr. 2. Hetta er grundað á tað óhepna í at skelta við, at talan er um ein bil, sum koyrir við pengum.

Eisini er ásett í stk. 2, at ásetingin um skelting ikki er galdandi fyri yvirvøku, sum ikki verður tikin upp, sbr. § 2, stk. 1, nr. 5. Orsøkin er m.a., at inntrivið fyri tann einstaka ikki er eins stórt, sum tá upptøkur verða bandaðar.

Sambært *stk. 3* kann landsstýrismaðurin áseta nærri reglur um skelting, sbrt. stk. 1. Líknandi áseting er í galdandi lóg, men heimildin er ikki brúkt.

Til § 8
Í § 8 er lagt upp til eina serliga áseting um víðarigeving og striking av mynda- og ljóðupptøkum, sum innihalda persónupplýsingar, og sum eru gjørdar í sambandi við yvirvøku við tí endamáli at fyribyrgja lógarbrotum.

§ 8 fevnir einans um víðarigeving og striking av upptøkum. Onnur viðgerð av persónupplýsingum á upptøkum, undir hesum innsavnan, er fevnt av vanligu reglunum um viðgerð av persónupplýsingum í dátuverndarlógini.

§ 8 fevnir einans um yvirvøku við tí endamáli at fyribyrgja lógarbrotum. Hetta ger, at um endamálið við upptøkuni er eitt annað, t.d. eftirlit við eini maskinu, so framleiðsla gongur sum hon skal, skal víðarigeving – um persónupplýsingar eru á upptøkuni – metast eftir vanligu reglunum um viðgerð av persónupplýsingum í dátuverndarlógini.

Stk. 1 snýr seg um víðarigeving av upptøkum, sum innihalda persónupplýsingar. Endamálið við eini serligari áseting um víðarigeving av upptøkum, sum innihalda persónupplýsingar, er m.a. at fyribyrgja almannakunngerð ella útbreiðslu á internetinum av upptøkum av lógarbrotum. Mett verður, at tað ikki er tann einstaki sum eigur upptøkurnar, sum skal gera av, um persónupplýsingar skulu almannakunngerast í sambandi við møgulig lógarbrot. Tað er politiið, sum ger av, um upptøkur í sambandi við lógarbrot skulu almannakunngerast og um tað er heimild fyri hesum, sbr. §§ 868-869 í rættargangslógini.

Við víðarigeving er at skilja, at ein annar enn tann, sum hevur ábyrgd av upptøkunum, fær atgongd til hesar. Tað kann vera við, at upptøkurnar verða givnar víðari gjøgnum internetið ella fysiskt. Fevnt er eisini at "screenshot" ella líknandi verður tikið av upptøkuni, og at henda myndin verður givin víðari. Víðarigeving fevnir eisini um, at ein persónur fær høvi at hyggja at upptøkunum uttan at fáa tær útlevaraðar.

Fevnt er tó ikki tann støðan, at upplýsingar, sum eru á upptøkunum, verða givnar víðari, t.d. um ábyrgdarin munnliga greiðir frá, hvat upptøkurnar innihalda. Ein slík víðarigeving av persónupplýsingum, sum eru viðgjørdar í vakmyndatólsskipanini, skal metast eftir vanligu reglunum í dátuverndarlógini. Tað merkir, at tað í hvørjum ítøkiligum føri skal takast støða til, um heimild er fyri, at upplýsingarnar munnliga verða givnar víðari. Hetta kann serliga vera viðkomandi, um ein handilseigari gerst varugur við, at eitt barn hevur stolið, og vil ringja til eitt foreldur heldur enn at geva upptøkurnar víðari til politiið.

Víðarigevingin skal vera til ein "uttanfyristandandi". Tað merkir, at um starvsfólk hyggja at upptøkunum, er hetta ikki at rokna sum ein víðarigeving sambært § 8. Um starvsfólkið kann

hyggja at upptøkunum, skal metast eftir vanligu reglunum í dátuverndarlógini og avgerandi er m.a., um starvsfólkið hevur eina sakliga orsøk at hyggja at upptøkunum.

Upptøkur, sum innihalda persónupplýsingar, kunnu gevast víðari í trimum førum.

Fyri tað fyrsta kunnu upptøkurnar gevast víðari, um tann, sum er á upptøkunum (tann skrásetti) hevur givið nágreiniligt samtykki, sbrt. *stk. 1, nr. 1*. Um fleiri persónar eru á upptøkunum, skulu allir geva samtykki.

At samtykki skal verða nágreiniligt hevur m.a. við sær, at tað ikki kann verða givið tigandi. At ein persónur fer inn í ein handil, sum skeltar við yvirvøku við vakmyndatóli, er ikki nokk til at koma til ta niðurstøðu, at viðkomandi hevur samtykt til víðarigevingina. Samtykki skal annars tulkast í samsvari við dátuverndarlógina (§ 8, stk. 1, nr. 1 og § 12, stk. 1, nr. 1).

Fyri tað annað kunnu upptøkurnar víðarigevast, um hetta er heimilað í lóg, sbrt. *stk. 1, nr. 2*. Hetta kann t.d. verða í sambandi við framløguboð (editionspálæg) eftir rættargangslógini ella í sambandi við, at ein eftirlitsmyndugleiki – sum hevur lógarheimild at krevja allar upplýsingar – krevur upptøkurnar útflýggjaðar.

Fyri tað triðja kunnu upptøkurnar víðarigevast til politiið til tess at politiið kann kanna og avdúka lógarbrot, sbrt. *stk. 1, nr. 3*.

Felags fyri allar móttakarar er, at hesir skulu viðgera persónupplýsingarnar, sum verða móttiknar, í samsvari við vanligu reglunum um viðgerð av persónupplýsingum. Hetta hevur m.a. við sær, at upplýsingarnar skulu strikast, um tær allíkavæl ikki vóru neyðugar hjá móttakaranum.

Sambært *stk. 2* skulu upptøkur fevndar av stk. 1 – t.e. upptøkur við persónupplýsingum, sum eru gjørdar við tí endamáli at fyribyrgja lógarbrotum – strikast í seinasta lagi 30 dagar eftir upptøkuna. Talan er um 30 kalendaradagar. At tað verður ásett ein ávís freist víkir frá vanligu reglunum í dátuverndarlógini, sum hava við sær, at persónupplýsingar ikki skulu goymast longur enn neyðugt við atliti at endamálinum við viðgerðini.

Tað er einki til hindurs fyri, at upptøkur verða strikaðar áðrenn 30 dagar eru farnir. Ásetingin hevur sostatt við sær eina evstu freist, og tað kann væntast, at ásetingin verður umsitin soleiðis, at upplýsingar verða strikaðar aftan á 30 dagar og ikki fyrr. Orsøkin til, at ein tíðarfreist á 30 dagar verður ásett, er m.a. tí at tað í ávísum førum kann verða neyðugt hjá t.d. politinum at fara eitt tíðarskeið aftur í tíð fyri at avdúka, um ein lógbrótari hevur verið á brotsstaðnum áður.

Í *stk. 3* er lagt upp til at víkja frá freistini uppá 30 dagar í sambandi við ítøkiliga ósemju hjá dátuábyrgdaranum. Hetta kann t.d. vera í málum um agatiltøk, t.d. burturvísing av starvsfólki. Ásetingin heimilar ikki tí einstaka dátuábyrgdaranum at goyma upptøkur um lógarbrot í meira enn 30 dagar. Er dátuábyrgdarin varur við eitt lógarbrot, skal henda upptøkan víðarigevast til politiið, sum ikki hevur skyldu at strika eftir 30 dagar.

Um talan er um eina ítøkiliga ósemju og upplýsingarnar harvið kunnu goymast longur, skal dátuábyrgdarin syrgja fyri, at upplýsingar um onnur, sum ikki eru viðkomandi fyri ósemjuna, so vítt møguligt verða strikaðar úr upptøkuni.

Dátuábyrgdarin skal kunna tann, sum ósemjan er við og eftir umbøn geva viðkomandi avrit av upptøkuni.

Til § 9
Lagt verður upp til at áseta í *stk. 1*, at Dátueftirlitið skal hava eftirlit við viðgerð av persónupplýsingum, sum fer fram sbrt. § 8.

Sambært § 66, stk. 2 í dátuverndarlógini hevur Dátueftirlitið eftirlit við allari viðgerð av persónupplýsingum, sum dátuverndarlógin fevnir um. Uppskotið til § 9, stk. 1 hevur við sær, at eftirlitsøkið hjá Dátueftirlitinum verður víðkað til at fevna um viðgerð av persónupplýsingum sambært § 8 í hesi løgtingslóg.

Umframt at hava eftirlit við, um § 8 verður hildin, skal Dátueftirlitið, sum nevnt eftir § 66, stk. 2 í dátuverndarlógini, hava eftirlit við allari viðgerð av persónupplýsingum, sum dátuverndarlógin fevnir um. Í §§ 5 og 6 er víst til, at viðgerð av persónupplýsingum í sambandi við yvirvøku við vakmyndatóli er fevnt av dátuverndarlógini.

Hetta merkir, at Dátueftirlitið hevur eftirlit við um myndugleikar, fyritøkur o.o. viðgera persónupplýsingar í samsvari við dátuverndarlógina. Tá ein myndugleiki, fyritøka o.a. yvirvaka við vakmyndatóli, skal tann viðgerð av persónupplýsingum, sum fer fram, sostatt vera innan fyri teir karmar og uppfylla tær reglur, sum dátuverndarlógin setur.

§ 9, stk. 1 hevur ikki við sær, at Dátueftirlitið hevur eftirlit við, at henda løgtingslógin sum heild verður hildin. Dátueftirlitið skal m.a. ikki geva loyvi til yvirvøku við vakmyndatóli og skal í útgangsstøðinum ikki taka støðu til, um yvirvøka er heimilað sambært § 3. Dátueftirlitið kann vegleiða um dátuvernd í sambandi við yvirvøku, men eftirlitið við, um løgtingslóg um vakmyndatól verður hildin, liggur – eins og tað ger eftir galdandi lóg – hjá politinum. Tað hevur m.a. við sær, at um ein gerst varur við, at eitt vakmyndatól er sett upp í ósamsvari við løgtingslógina, er hetta eitt brot, sum skal meldast til politiið, sum síðani kannar málið.

Í *stk. 2* verður lagt upp til, at tann, sum setur vakmyndatól o.a. upp, skal boða Dátueftirlitinum frá hesum, og at Dátueftirlitið førir eina skrá yvir hesi tól.

Orsøkin til hesa áseting er fyri tað fyrsta at halda eyga við gongdini á yvirvøkuøkinum, og at tryggja vanligt skilhald á økinum. Yvirvøka við vakmyndatóli kann vera eitt inntriv í frælsið hjá tí einstaka, og tí er neyðugt at halda eyga við gongdini á økinum, eins og ein fráboðanarskylda kann hava við sær avmarking í nýtslu. Fyri tað næsta skal ein skrá tryggja, at tað er møguligt hjá politinum skjótt at kanna, um vakmyndatól eru í einum øki, sum er viðkomandi fyri kanning av einum ítøkiligum máli.

Talan er um eina fráboðanarskipan og ikki um eina loyvisskipan. Dátueftirlitið skal tí ikki geva loyvi til uppseting av vakmyndatólum. Dátueftirlitið kann tó vegleiða um hesa løgtingslóg og dáturættarligu avbjóðingarnar við yvirvøku o.s.fr. Um eitt fráboðað vakmyndatól greitt er í ósamsvari við hesa løgtingslóg, skal Dátueftirlitið sjálvandi eisini gera vart við hetta. At talan ikki er um eina loyvisskipan er í samsvari við skipanina á dátuverndarøkinum, har sum man við nýggju dátuverndarlógini fer burtur frá, at loyvi skal gevast til viðgerð frammanundan.

Upplýsingar skulu latast Dátueftirlitinum, so tað er púra greitt, hvar vakmyndatólið er sett upp og hvat upptøkan fevnir um.

Til tess at tryggja, at yvirlitið hjá Dátueftirlitinum yvir vakmyndatól altíð er dagført, er ásett í *stk. 3*, at munandi broytingar í yvirvøkuni skulu fráboðast. Hetta kann t.d. vera, um eitt vakmyndatól verður tikið niður, ella um tað verður flutt. Í metingini av, um broytingin er munandi, skal hædd takast fyri endamálinum við skránni, sum m.a. er, at politiið kann fáa upplýsingar um, hvar yvirvøka fer fram og hvør stendur fyri henni.

Til § 10
Ásetingin inniheldur reglur um revsing.

Sambært *stk. 1* verður brot á § 2, § 7, stk. 1 og § 9, stk. 2 og 3 revsað við sekt. Hetta ger, at tað verður revsivert at bróta bannið móti yvirvøku í § 2, kravið um skelting í § 7, stk. 1 og fráboðanarskylduna í § 9, stk. 2 og 3.

Sambært *stk. 2* verða eisini brot á treytir í loyvum sambært § 4, stk. 1 revsað við sekt.

Í *stk. 3* verður lagt upp til, at brot á § 8 um víðarigeving av upptøkum kann revsast við sekt ella fongsli í upp til 6 mánaðir um ikki hægri revsing er ásett í aðrari lóggávu.

Orsøkin til, at revsiramman fyri hetta brotið er 6 mánaðir er, at revsiramman eigur at vera sambærilig við brot á líknandi ásetingar. Brot á § 264 d í revsilógini um av órøttum at víðarigeva boð ella myndir, ið viðvíkja persónligum viðurskiftum eins og brot á dátuverndarlógina kunnu revsast við sekt ella fongsli í upp til 6 mánaðir.

Í samsvari við § 19 í revsilógini fevnir revsiásetingin bæði um tilætlað og óviljað brot á nevndu ásetingar.

Í *stk. 4* er ásett, at revsing kann verða ásett í reglum givnum við heimild í løgtingslógini, og í *stk. 5* er ásett, at feløg og aðrir løgfrøðiligir persónar koma undir revsiábyrgd eftir reglunum í kapitli 5 í revsilógini.

Sambært *stk. 6* kunnu reglurnar um húsarannsókn í rættargangslógini fyri Føroyar nýtast samsvarandi í sambandi við brot á hesa løgtingslóg. Reglurnar um húsarannsókn eru í kapitul 86 í rættargangslógini fyri Føroyar, sum kemur í gildi 1. januar 2021. Sambært reglunum um húsarannsókn í rættargangslógini er tað í útgangsstøðinum krav, at brotið kann hava við sær frælsisrevsing, um húsarannsókn skal kunna fara fram.

Tað er politiið, sum fremur húsarannsókn eftir rættargangslógini. Húsarannsóknin krevur í útgangsstøðinum rættarúrskurð, og ásetingin í hesum lógaruppskoti broytir ikki hetta.

Orsøkin til, at tað er lagt upp til, at húsarannsókn kann nýtast í málum um brot á hesa løgtingslóg, sjálvt um brot á løgtingslógina (undantikið § 8) einans hava við sær sekt, er, at tað í slíkum málum kann verða serliga neyðugt at fáa fatur á útgerðini, sum er nýtt til brotið.

Til § 11
Lagt verður upp til, at løgtingslógin kemur í gildi 1. januar 2021, og at galdandi lóg um forbud mod privates tv-overvågning samstundis fer úr gildi.

Orsøkin til, at løgtingslógin skal fáa gildi frá 1. januar 2021 er, at lógin á tann hátt kemur í gildi samstundis sum nýggja dátuverndarlógin. Henda løgtingslógin og dátuverndarlógin hava virkisøki, sum í stóran mun hanga saman, og tí er ein felags gildiskoma 1. januar 2021 mett skilagóð.

Í *stk. 2* er lagt upp til eina skiftisskipan, sum skal tryggja, at vakmyndatól, sum eru sett upp, áðrenn henda løgtingslóg kemur í gildi, verða fráboðað Dátueftirlitinum í seinasta lagi 1. juli 2021. Hóast ein fráboðanarskylda er í kunngerð um fráboðanarskyldu og undantøk frá reglunum um viðgerðarloyvi, og at Dátueftirlitið tí átti at havt yvirlit yvir vakmyndatól, verður lagt upp til eina skiftisskipan. Hetta er serliga fyri at tryggja, at skráin, sum Dátueftirlitið skal føra, sbrt. § 9, stk. 2, verður fullfíggjað.

Løgmansskrivstovan, 3. november 2020

Bárður á Steig Nielsen
løgmaður

/ Marjun Hanusardóttir

Yvirlit yvir fylgiskjøl:
Fylgiskjal 1: Fiskimálaráðið
Fylgiskjal 2: Vinnuhúsið
Fylgiskjal 3: Betri
Fylgiskjal 4: Umhvørvis- og vinnumálaráðið
Fylgiskjal 5: Uttanríkis- og mentamálaráðið
Fylgiskjal 6: Heilsumálaráðið
Fylgiskjal 7: Kommunufelagið
Fylgiskjal 8: Føroya Politi
Fylgiskjal 9: Almannamálaráðið
Fylgiskjal 10: Atlantic Airways
Fylgiskjal 11: Elektron
Fylgiskjal 12: Dátueftirlitið
Fylgiskjal 13: Bank Nordik
Fylgiskjal 14: Trygdartøkni
Fylgiskjal 15: Ummælisskjal